TILTØK

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.

LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geilsgøtu 1 er opin allar gerandisdagar frá kl. 9.00-12.00.
Telefon: 310197.
Teldupostadressa: lisa@lisa.fo – heimasíða www.lisa.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya)
heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn
Tlf. 315624, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
100 Tórshavn

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild, e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897, e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.



STARVSLÝSING

STARVSFÓLK TIL

TELEFON-MÓTTØKUNA

Tryggingarfelagið Føroyar S/F hevur høvuðsskrivstovu á Kongabrúnni í Havn og 5 deildir kring landið. Tryggingarfelagið Føroyar selur allar tryggingar bæði til privatkundar og til vinnukundar. Í felagnum arbeiða uml. 120 fólk. Øll starvsfólk í felagnum fáa eina grundleggjandi tryggingarfakliga útbúgving, og verða víðariútbúgvin innan starvsøki teirra.

Elskar tú at tosa í telefon? Er svarið Ja, so er hetta starvið kanska nakað fyri teg!

Vit søkja eftir einum fólki til at røkja telefonmóttøku okkara. Tú kemur at arbeiða í einum toymi, har tú saman við góðum starvsfeløgum hevur ábyrgdina av, at fyrsta samskiftið við kundan er ein fragd.

Tínir persónligu eginleikar eru:
- Tær dámar væl at samskifta við øll fólk
- Tú hevur "smíl" í røddini
- Tú dugir væl at samstarva
- Tú ert álítandi og røkin

Tú verður ein sentralur persónur í arbeiðinum at náa telefonmálsetningum felagsins. Samstundis verður tú partur av einum nýggjum deildarumhvørvi, har neyðug útbúgving er ein náttúrligur partur av gerandisdegnum.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og AFF.

Hevur tú hug at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Henry Olsen, deildarstjóra, tlf. 345509 ella til Rannuá Leonsdóttir, tlf. 345600.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við viðkomandi skjølum innan tann 4. oktober 2002 til:

Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postboks 329
FO-110 Tórshavn

SANSIR TEL 355355

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Kongabrúgvin, Postboks 329, FO-110 Tórshavn, Tel 345600, Fax 345601, tf@trygging.fo, www.trygging.fo

'U'NC
TK Stovan

Byrja egið virki?

TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.

Virkisráðgevar okkara eru til taks við vitan, royndum og amboðum. Vit skifta fegin orð um tínar menningarætlanir og veita góð ráð og holla vegleiðing.

31 73 66
www.tk.fo

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fo
E-mail tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

Lesið Sosialin

FÓLKADANSUR

Fólkadansur í bygdarhúsinum í Hósvík

Byrjað verður sunnukvøldið 6. okt. kl. 19.00-21.00

kr. 400,- pr. par

Tilmelding á telefon:



Ann	422368
Elin	422291
Ida	422425

Dansifelagið Fragdin

Øll eru vælkomin!

Sosialurin -tað loysir seg

Gøtu Kommuna

søkir

1 dagrøktara at byrja skjótast tilber.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarliga, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøki uttanfyri.

Í skipanini eru tveir dagrøktarar, ein í Syðrugøtu og ein í Norðragøtu. Vit hava skipað eina spælistovu, har dagrøktarar saman við børnunum og leiðaranum koma saman til ymiskt eina ferð um vikuna frá kl. 7.30 til kl. 12.00. Vit eru í stovuni sum frítíðarskúlin brúkar.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya Kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Torgerð Hansen, tlf. 442012 lokal 10.

Skrivlig umsókn skal sendast okkum áðrenn mánadagin 14. oktober 2002.
Bygdarráðið tekur sær rætt til frítt at velja ímillum umsóknirnar ella ongan at seta.

Dagstovnurin í Gøtu
boks 32
511 Gøtugjógv

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Skrivarar til uttanríkistænastuna

Tvey skrivarastørv hálva tíð, ávikavist í Sendistovu Føroya í Bretlandi (London) og í sendistovu Føroya í Evropasamveldinum (Brússel), eru leys at seta frá 1. november 2002 ella skjótast til ber.

Uppgávur
Tann, ið settur verður, verður partur av dagligu arbeiðsgongdini á avvarðandi sendistovu. Starvið fevnir í høvuðsheitum um vanligar skrivarauppgávur, eitt nú samskipan av telefon, brævasamskifti, røkt av heimasíðu, røkt av útbúnaði og at hjálpa til við at samskipa millumtjóða tiltøk.

Førleikakrøv
Umsøkjarar eiga at hava skrivstovuútbúgving ella aðra samsvarandi útbúgving. Umsøkjarar við viðkomandi arbeiðsroyndum kunnu eisini søkja. Serligur dentur verður lagdur á góðan málkunnleika bæði í skrift og tal. Fyri sendistovuna í London verður dentur lagdur á føroyskt og enskt. Fyri sendistovuna í Brússel verður dentur lagdur á føroyskt, enskt, franskt og framskt.

Umsøkjarar eiga at hava góð samstarvsevni, vera skilagóðir, áhitnir, miðvísir, kunna arbeiða sjálvstøðugt og vera til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar.

Starvsstaðið
Starvsstaðið verður ávikavist Sendistova Føroya í Bretlandi, 55 Sloane Street, London SW1X SR ella Sendistova Føroya í Evropasamveldinum, Rue d'Arlon 69, B-1040 Brussels. Sendistovurnar eru skipanarliga samrunnin partar av Løgmansskrivstovuni.

Setanartreytir
Størvini eru hálvtíðarstørv og verða skipað samsvarandi teim reglum, sum eru galdandi í danska uttanríkismálaráðnum fyri starvsfólk sett á staðnum. Roknað verður tískil við, at fólk hava sjálvstøðugan bústað nærhendis sendistovuni.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Herluf Sigvaldsson, deildarstjóra í uttanríkisdeildini á Løgmansskrivstovuni, tlf. 351010, ella til John Rajani, sendimann í London, tlf. +44 (0) 20 7333 0227 ella til Hákun J. Djurhuus, sendimann í Brússel, tlf. + 32 (2) 233 08 55.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum verða at senda

Løgmansskrivstovuni
Tinganesi
FO-100 Tórshavn
Telefaks 351015 · Teldupostur info@tinganes.fo

og vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi týsdagin 8. oktober 2002.

***Løgmansskrivstovan** er fyrisiting hjá løgmanni. Hon fevnir millum annað um uttanríkistænastuna við uttanríkisdeild og sendistovum í ávíkavist Bretlandi, Danmark og Evropasamveldinum og situr fyri málum, ið eru løgd til løgmann sambært stýrisskipan Føroya umframt uttanríkismálum.*

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Leygardagin 28.09. kl. 20^{30}
Leygardagin 28.09. kl. 23^{15}
Sunnudagin 29.09. kl. 20^{00}
Sunnudagin 29.09. kl. 22^{45}

Leygardagin 28.09. kl. 16^{30}
Leygardagin 28.09. kl. 18^{30}
Sunnudagin 29.09. kl. 16^{00}
Sunnudagin 29.09. kl. 18^{00}

Billettprísur: 45,- kr.
Leygardagin 28.09. kl. 17^{00}
Sunnudagin 29.09. kl. 16^{30}



Leygardagin 28.09. kl. 23^{30}
Sunnudagin 29.09. kl. 23^{00}



Leygardagin 28.09. kl. 21^{00}
Sunnudagin 29.09. kl. 20^{30}



Leygardagin 28.09. kl. 19^{00}
Sunnudagin 29.09. kl. 18^{30}

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

Eykalutir og USbilar frá AUTO TRADE
...altíð røttu vøruna fyri rætta prísin

Chevrolet Astro Van 4x4 aut.

Minibussur til 7 ferðandi, 4,3i V6 við 190 hk, aut. gear, 4x4, árg. 10/95, 186.000 km., blámetallic, ABS bremsur, 2x airbag, servostýring, fjarðstýrt sentrallás, er-rútar, el-spegl, el-setur, myrkar rútar aftan, alu-felgur, radio við band og CD spælara. Bilurin er innfluttur brúktur úr Kanada og er í sera góðum standi. Verður handaður nýsýndur við 3 mðr. garanti

Prísur kr. 163.000

Mazda 323 1,5i 16V

1,5i 16V 88 hk, man. gear, árg 12/98, 51.000 km., silvur metallic, ABS bremsur, 2x airbag, sservosýring, sentrallás, tónaðar rútar, alu-felgu, radio við band avspælarar.
Bilurin er í sera góðum standi og verður handaðu nýsýndur.

Prísur kr. 94.800

Innfluttir bilar verða handaðir nýsýnaðir við 3. mðr garanti

AUTO TRADE
Slættanesgøta 8 - Postsmoga 253 - FO-110 Tórshavn
Tel. 320 280 & 210 284 - Fax 320 282 - e-mail: autotrade@kallnet.fo
EYKALUTIR: *-alt innan karossarí frá KLOKKERHOLM*

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 536, Sp/f Tummas Thomsen, 700 Klaksvík.

Stjórn:
Farin frá sum stjóri:
Tummas Thomsen, Gerðagøta 12, 700 Kaksvík.
Innkomin sum stjóri:
Jóhan Ólavur Thomsen, Kambsdalur, 530 Fuglafjørður.

Skráseting Føroya tann 26. september 2002

Kristin Balle

Til sølu

Í sambandi við niðurtøku av sethúsinum Markna-gilsvegur 81 A, verða hesir lutir seldir:
Køkur, hvítvørur, oljufýr, ketil, oljutangi, rottangi, vindeygu, hurðar, trappa og ymiskt annað.

Sølan fer fram á staðnum **mikudagin 2. oktober kl. 15.00.**

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo